# Asta Petrauskiene skal venja STÍF

**Av Skála vóna tey eisini at fáa Sóley Mikkelsen heimaftur**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*



*Litavski toppskjúttin í fjør, Asta Petrauskiene, skal komandi vera leikandi venjari hjá STÍF.*
*Mynd: Savnsmynd*

Toppskjúttin í fremstu kvinnudeildini í fjør, litaviska Asta Petrauskiene, skal komandi kappingarár vera leikandi venjari hjá kvinnunum hjá STÍF. Eftir lokna hondbóltsárið í fjør setti STÍF seg í samband við Sóljuna og fingu at vita, at Asta Petrauskiene var leys av Sóljuni, og tí var ongin forðing í at seta seg í samband við leikaran

Litaviski spælarin og STÍF eru komin ásamt um ein eitt ára sáttmála, har Asta Petrauskiene umframt at venja og spæla við 1. kvinnuliði hjá STÍF, eisini skal venja øll kvinnuliðini í felagnum.

## Málverjan úr Sóljuni við sær

Litaviski liðfelagin í Sóljuni, Kristina Griksaite, kemur við Astu Petrauskiene á Skála, har hon skal verja málið hjá STÍF í vetur. Málverjin í fjør, Ingun Mørkøre, skal undir útbúgving í Danmark, og verður tí ikki við í vetur.

Venjarin tvey tey seinastu árini hjá kvinnuliðnum hjá STÍF, rumenska Ileana Manolescu, er farin av landinum aftur, og hon verður ikki aftur at síggja á Skála. Ileana Manolescu var í Føroyum í trý ár, har hon umboðaði bæði Neistan og STÍF.

Hin rumenin hjá STÍF, Alina Olaru, fer ongan veg, og hon tekur enn eitt tørn við STÍF. Hetta verður triðja árið hjá rumenanum í Føroyum.

## Møguliga eisini Sóley Mikkelsen

Ein av bestu kvinnuligu hondbóltspælarunum í landinum, Sóley Mikkelsen, er møguliga eisini á veg til STÍF. Sóley hevur tvey tey seinastu árini verið ein av høvuðsstuðlunum á meistaraliðnum hjá VÍF, og í løtuni umhugsar hon at flyta heimaftur til barndómsfelagið av Skála.

Tó er onki endaligt komið burturúr, men av Skála vóna tey sum vera man, at hon verður at síggja á STÍF-liðnum í vetur.

Fær STÍF Sóley Mikkelsen í hópin, skuldi tað avgjørt verið møguleiki at gjørt seg galdandi í ár, við tveimum so stórum profilum sum Sóley Mikkelsen og stórskjúttanum Astu Petrauskiene á liðnum.

Annars verður sagt av Skála, at kvinnuliðið er farið undir konditións- og styrkivenjing, og at tey gleða seg til hondbólturin fer á rull aftur.

# Nú er klárt til norðurlendsku uppgerðina

**Brøndby hevði ongar trupulleikar at vinna í Albania, og nú skulu teir stríðast við norska meistaraliðið Rosenborg um eitt pláss í europeisku meistarakappingini**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið møguleiki fyri tí, síðani lutur varð kastaður um, hvussu liðini skuldu hittast í Europa Cup kappingunum, og nú er tað vorðið til veruleika. Danska Brøndby og norska Rosenborg skulu í innanhýsis kapping gera av, hvat av hesum báðum liðunum skal vera í hattinum, tá tað síðst í hesum mánaðinum fer at verða drigið um, hvussu liðini í europeisku meistarakappingini skulu bólkast.

Rosenborg hevur ikki luttikið í tveimum teimum fyrstu undanumførunum. Góðu úrslitini hjá teimum í Europa Cup tey nógvu seinastu árini hava havt við sær, at teir hava bíðað, inntil møguligu mótstøðuliðini hava stríðst fyri at sleppa so langt.

Danska Brøndby hevur hesa seinastu vikuna spælt ímóti albanska meistaraliðnum, Dinamo Tirana. Í síðstu viku vann Brøndby 1–0 á heimavølli, og mikukvøldið vóru teir uppaftur meiri sannførandi í albanska høvuðsstaðnum Tirana, har Brøndby vann 4–0.

Í 1. hálvleiki kom einki mál. Men stutt eftir steðgin skoraði Peter Madsen, sum annars ikki hevur skorað higartil í hesum kappingarárinum, og so punkteraði heimaliðið. Teir tóktust ikki trúgva uppá, at teir skuldu megna at skora trý mál. Brøndby hevði í 2. hálvleiki fullkomna yvirvág, og tá teir í síðstu løtu fingu brotsspark, fekk Auri Skarbalius møguleikan at skora. Hetta var dystur nummar 155 hjá honum í Brøndby troyggjuni, og hann hevði ongantíð skorað frammanundan.

Brøndby hevur nógvar royndir í Europa Cup. Dysturin mikukvøldið var tann 90. hjá teimum í europeisku kappingunum, og sigurin var tann 40.

Michael Laudrup var rímuligt nøgdur, og hann segði seg einki kenna til mótstøðuliðið í komandi viku, Rosenborg. Hjálparvenjarin í Brøndby, John Faxe Jensen, fer í vikuskiftinum til Noregs at fylgja við landskappingardystinum hjá Rosenborg.

Merkisvert er tað, at fyrrverandi Brøndby venjarin, Åge Hareide, á nýggjárinum verður nýggjur venjari hjá Rosenborg. Einki er at ivast í, at hann gevur komandi felagnum hjá sær ráð og vegleiðing í, hvussu teir best kunnu fella Brøndby.

Fyrri dysturin verður í Tróndheimi í komandi viku, og í aðru viku fer at verða spælt í Brøndby.

# KÍF leitar aftur til Jugoslavia



*Jugoslavarnir Durica Tomic og Iljan Topic verða ikki á síggja á liðnum hjá KÍF í vetur, men KÍF fer framvegis at ráða fyri jugoslavum, tí tríggjir nýggir jugoslavar eru á veg til felagið*
*Mynd: Savnsmynd*

**Durica Tomic og Iljan Topic eru farnir av landinum, og Kári Durhuus skal venja KÍF í vetur**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Nú flestu hondbóltsfeløg eru farin undir fyrireikingar til komandi kappingarár, hava fleiri feløg nýtt hondbóltssteðgin til at leita sær styrk til hondbóltskappingina í vetur.

Eitt av feløgunum, ið hevur roynt at styrkt sær um liðið, eru kollfirðingar. 1. september er ætlanin, at tríggjar jugoslavar koma til Føroya at leika fyri KÍF. Talan er um tveir bakspælarar og ein málverja.

Úr KÍF verður sagt, at allir tríggjir eru fyrst í 20´unum, og at teir eru góðir hondbóltsspælarar, ið avgjørt fara at styrkja um liðið.

Sambandið við jugoslavarnir eru komið í lag gjøgnum spælandi jugoslaviska venjaran hjá KÍF í fjør, Durica Tomic. Durica Tomic er úr býnum Sombor, og teir tríggjir nýggju jugoslavarnir eru úr sama býi.

## Tomic og Topic ikki heimaftur

Seinastu árini hava kollfirðingar havt jugoslavarnar, Durica Tomic og Iljan Topic á liðnum. Báðir spælararnir eru farnir av landinum, og teir koma ikki aftur til Føroya.

Umframt at spæla við, var Durica Tomic eisini venjari hjá KÍF, og tí hevur KÍF sett nýggjan venjara. Venjari hjá KÍF í vetur verður vestmenningurin Kári Durhuus. Kári hevur verið venjari hjá KÍF fyrr, og hetta var einaferð í 90´árunum.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 9. august til hósdagin 15. august**

## Fríggjadagur

19.00 Minty og Melanie



21.10 Blindt raseri



## Leygardagur

19.45 Hví ikki meg?



19.00 The Commitments



## Sunnudagur

20.00 Fyrsti fongurin



20.00 6 dage og 7 nætter



## Mánadagur

18.30 Likkulikkuleia (e)



19.30 Deep end of the ocean



## Týsdagur

19.00 Fuglurin Føniks



19.00 Robinson opgøret: Henrik vs Janne



## Mikudagur

20.00 Gesturin



21.40 Det russiske hus



## Hósdagur

20.50 Ally McBeal



19.30 Mysterious ways



## Fríggjadagur 9. august

**SvF**

18.30 Likkulikkuleia 24
19.00 Minty og Melanie 5:13
19.25 Gesturin e
20.00 Dagur og Vika
20.20 Íbúðin verður broytt
20.45 Gekkur
21.25 Horvin - amerikanskur filmur
22.50 Sølumaður til sølu - amerikanskur filmur
00.30 Liðugt

**Eurosport**

07:30 Lg Super Racing Weekend™: Lg Super Racing Weekend™ Magazine
08:00 Sailing: Sailing World
08:30 Athletics: European Championship Munich Germany
08:45 Athletics: European Championship Munich Germany
12:00 Rally: World Championship Finland
12:30 Lg Super Racing Weekend™: Lg Super Racing Weekend™ Magazine
13:00 Athletics: European Championship Munich Germany
15:00 Athletics: European Championship Munich Germany
21:00 Aerobics: World Championship Lithuania Murska Sobota
22:00 Strongest Man: Grand Prix Turkey
23:00 News: Eurosportnews Report
23:15 Rally: World Championship Finland
23:45 Xtreme Sports: Yoz Mag
00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC Prime**

0.00 TLZ: »Freedom's Battle – Prague - Magic Lantern«
1.00 TLZ: »Supernatural Science – Secrets of Levitation«
2.00 TLZ: »Phobias«
3.00 TLZ: »Back to the Floor – Hovis«
3.30 TLZ: »The big Deal – In the Blood«
4.00 TLZ: »Creatous Greenhouse World«
4.50 TLZ: »Ever Wondered?«
5.00 TLZ: »Buongiorno Italia! – Cosa Ha Fatto?«
5.30 TLZ: »Starting Business English«
6.00 Noddy: »Noddy and the Fishing Rod«
6.10 Noddy: »Noddy and the Warm Scarf«
6.20 Playdays: »Tent Stop«
6.40 Superted
6.50 Big Knights: »Clockwork Knights«
7.00 Smart
7.20 The Really Wild Show
7.45 Garden Invaders
8.15 Real Rooms: »Redditch, Streetly«
8.45 Antiques Roadshow: »Newmarket Special«
9.15 Charlie's Garden Army: »Dorset«
9.45 Gardeners' World
10.15 The Weakest Link
11.00 To the Manor Born
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »4.50 from Paddington« Part 2
13.30 Garden Invaders
14.00 Noddy: »Noddy and the Fishing Rod«
14.10 Noddy: »Noddy and the Warm Scarf«
14.20 Playdays: »Tent Stop«
14.40 Superted
14.50 Big Knights: »Clockwork Knights«
15.00 Smart
15.20 The Really Wild Show
15.45 Lovejoy: »Goose Bumps«
16.45 Dangerous Australians
17.45 The Weakest Link
18.30 Liquid News
19.00 Parkinson: »Stephen Fry, Larry Hagman, Cher, Gabrielle«
20.00 Dalziel and Pascoe: »Deadheads«
21.35 Later With Jools Holland: »Jamiroquai, White Stripes, Muse«
22.35 Top of the Pops Prime
23.05 Totp Eurochart
23.35 Dr. Who: »The Curse of Fenric«

**BBC World**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Talking Movies (r)
2:00 BBC News
2:30 Life (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Talking Movies (r)
9:00 BBC News
9:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Life (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Talking Movies (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Mary Anne's Bikes (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Predictions
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Correspondent
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**TV3**

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:15 Tv-Shop
09:20 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Ricki Lake
12:50 Family Law
13:50 Mr. Rock 'N' Roll
15:35 The Ellen Show
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Vild Med Dig
18:00 Med På Moden
18:30 Alle Tiders Barnepige
19:00 To Tosser Bag Tremmer
21:10 Blindt Raseri
22:45 Sexorama
23:20 Pornomodellens Privatdetektiv
01:20 Walker Texas Ranger
02:20 Jesse James Sidste Skud
04:10 V.I.P.
05:00 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur
7.15 Morguntónleikur
7.30 Tíðindi
7.35 Góðan morgun Føroyar
8.00 Tíðindi
8.03 Góðan morgun Føroyar
9.00 Tíðindi
9.03 Garpatáttur (e) - Hans Tórgarð lesur 14. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness, sum Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs hava týtt.
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Máltráðurin
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Í víngarðinum (e) - Victor Carlsen stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Barometrið
16.00 Tíðindi
16.03 Barometrið
17.00 Tíðindi
17.05 Vikuskiftið
18.00 Fríggjakvøldstónar - Birgar Johannesen velur løgini
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Villar víddir - Fróði Løkságarð og Eyðun Klakkstein leggja til rættis
20.00 Estudio 2000 - Kári Annand Berg stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Annika B Mortensen leggur til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.30 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Annika B Mortensen leggur til rættis
16.00 HB - Rásin - Sending um og við fólki frá ítróttarfelagnum HB
17.00 Tónleikur
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
23.00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
14.00 Brot og bitar (e)
14.30 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna v/Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen.
16.30 Tónleikur
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379.
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
19.00 "Jesus og eg" barnasending við Stellu Zachariassen
20.00 "Jesus Revolution" við Alex O'Campo
22.00 Tónleikur
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri leygardag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
00:00 SMS'ið. Ungdómssending við Mourits Clementsen.
02.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast